gult14 cyan14 magenta14 svart14



VIÐMERKINGAR

# Abstinensir av miseydnaða misálitinum?



**Tórbjørn Jacobsen,**
*landsstýrismaður*
*Glyvrum, 14. mai 2001*

**Fólk eru ivaleyst ørkymlað av fjarðarokinum, nú skjøtil er settur á ein politiskan hanakamp um tøl, ímillum tveir leikmenn, ið helst báðir tveir hava líka lítið skil á búskaparfrøði, sum hundur á himmiríki. Tað fall mær av munni vesturi í Vágum, at brúkti parturin av donsku heildarveitingini svaraði til 8% av føroyska búskapinum. Ákærurnar flúgva um oyrini. Kristian Magnussen heldur fast við, at tað snýr seg um 50%. Endaligu útrokningarnar siga nú, at rætta talið er 4,35%. Samstundis sum eg takki javnaðarmanninum fyri, at hann varpar ljós á hendan veruleikan, at føroyingurin einki hevur at óttast í sjálvræðinum, verður hetta ein roynd, at svara honum aftur sum frægast.**

Sum ein annar forrættari skoðar hann út so víðan. Kristian Magnussen. Líkist kamelinum hjá Viderø undir Karmel-fjalli. Bara hann kendi hin eina sannleikan, og tí kundi hann standa har, so dulin at sær, við ovmetnaðarfulla yvirbragdinum. Moustachan er eisini har. Hendan evsta royndin hjá øllum politiskum tufluhetjum, at prógva fyri alheiminum, hvørið hevur brøkurnar uppiá. Í hesum førinum kann tað so bara verða ein pseudoroynd í macho. Tá ið svarað verður aftur, hevði tað kanska verið eitt hugskot, at kloynt ein columbianskan hatt niður á krúllin og hongt nakrar fjákutar oyraringar uppí oyrini, tá hevði man av illum, fingið accosiatiónir tann vegin, at landsins fremsti ljósasløkkjari var ein partur av átakinum. Politiskar karrierur í mistreysti. Hann náði meg.

Misálitasøgan hjá Javnaðarflokkinum er eitt mál fyri sálarfrøðingar. Tey flestu hava fingið ta fatan, at seinasta royndin druknaði í øli og breyði uppi á tinghúsloftinum. Men er hetta nú allur sannleikin? Rakti eisini hendan royndin Kristian og hansara menn, - sum ein boomerangur? Fari í hvussu er at takka tí tingmanni floksins, sum hevur latið meg frætta, at hann ikki hevði atkvøtt fyri misálitinum. Hann mundi ikki halda at ein føroyskur ministari skuldi kippast av so lítlum. Av kókaðum hønum og gemenum bókhaldarum.

Og appropos, gemenir bókhaldarar, lat meg so sláa fast alt fyri eitt, at tað varð kanska tikið í so dýran til hendan dagin. Eg havi alrastørstu virðing fyri landsgrannskoðaranum, Leivi Harrysyni. Tað er ikki so lítið hann hevur fingið á skaftið hesi árini. Hevur tosað Roma beint ímóti. Óræddur og djarvur. Hevur virkað soleiðis sum ein ríkisrevisión eigur at gera tað. Hevur í stóran mun fingið skil á rangum og røttum. Ákæran gongur ikki ímóti honum, - soleiðis sum hon nú er yvirtulkað. Trupulleikin er, at teir ið hava fólksins mandat, hvørki hava bøllingar ella rygg til at fremja tað lógarsmíð, sum væntað verður av teimum. Teir stinga upp fyri eksternum hóttanum, og hesum kann fólkaræði ikki liva við. Og í síni egnu avmakt røkka teir ikki longur enn at ætlað eitt misálit á mannin, ið gjørdi sína skyldu, - legði eitt progressivt uppskot fram, um hvussu almennu fjølmiðlarnir skula virka frameftir. Onkuntíð hevur politiski ryggurin í tingmanni fólkafloksins í Eysturoy verið kvæmari enn nú.

Annar av gomlu Moskvakommunistunum í Javnaðarflokkinum hevur eftir øllum at døma somikið av tjóðskaparkenslu eftiri í sær, at hann fæst við, at leita eftir politiskari føði inni á heimasíðu Tjóðveldisflokksins. Umrødda flaggrøðan finst bara har og á míni egnu teldu.

Og kjarni málsins (Tórbjørn vs. Kristian) eru nú hesar báðar orðingarnar:

*Tórbjørn:* **"Tað er ein sannroynd, at bara 8% av danska blokkstuðlinum komu inn í føroysku ringrásina, í árinum sum farið er."**

*Kristian:* **"Nú veit eg ikki hvussu Tórbjørn roknar prosentir, tá ið hann kann fáa umleið 50% at verða 8%. Nú eru vit í tí hepnu støðu, at landskassaroknskapurin fyri 2000 longu er framlagdur og sambært roknskapinum var yvirskotið í 2000 475 mió, tá eisini avdrátturin uppá 127 mió av landskassans skuld til danska statskassan var goldin. Blokkstuðulin fyri 2000 var 973 mió og tá landskassans yvirskot "bert" var 475 mió, so merkir hetta at í øllum føri, at 498 mió av blokkstuðlinum vóru brúktar til at avhalda landskassans útreiðslur. Umroknað til % gevur hetta umleið 50% og ikki 8%. Hevur Tórbjørn rætt við sínum 8% so vóru bert 78 mió av blokkstuðlinum í 2000 nýttar til landskassans útreiðslur."**

**Kristian Magnussen, hentur býttlingi hjá Nyrup(!)**

Í 1959 byrjaði av álvara ein peningastreymur at floyma inn úr Danmørkini. Hann hevði bara til endamáls, at niðurpína kensluna hjá føroyingum av, at teir megnaðu at standa uppi av sær sjálvum búskaparliga. Átakið var væl umhugsað frá danskari síðu. Peningurin skuldi fíggja ellisárini hjá føroyingum. Hetta var avgerandi royndin, harið føroyingar skuldu venjast við, at kenna tryggleika í peningi, sum danska valdselitan kravdi inn frá fiskimonnum á Borgundarhólmi, pedagogum í Áarósa og lossingarmonnum í Esbjerg.

Í fyrstu útgávuni av føroyska lógarritinum, sum hin virkni grundlógarskrivarin, Kári á Rógvu, hevur fingið í lag, finnst ein grein, sum tveir serfrøðingar í altjóðarætti hava skrivað. Báðir virka teir í Bruxelles. Í greinini vísa teir á, at endamálið hjá dønum, við at senda føroyingum pening er, og hevur altíð verið, at styrkja og røkja eina ófrælsis- & ótryggleikamentan millum føroyingar, - "a culture of fear."

Tað varð staðfest við sjeytummaseymi undir kreppuni og fyri hvønn dag sum liðin er síðani, at talan var og er ikki um annað, - enn falskan tryggleika.

Tað varð ikki farið fram við mýkindum undir seinastu føroyaviðgerðini á Danatingi. Øgiligar búskaparligar hóttanir, - men vælsignaður, - einki annað enn innantómar brestingar. Fólkatingslimir gramdu seg um alt frá "gensidig respekt" og "de historiske bånd" til mikla høvundin William Heinensen, sum teir eftir øllum at døma ikki hætta sær undir at lesa aftur, um føroyingar skuldu verið so náðileysir, at teir yvirtaka sína egnu kirkju ella eftirlitið við sínum egnu skipum.

Tað var týðuligt, at fólkatingslimirnir høvdu ein trupulleika hendan dagin. Ein avgerandi trupulleika. Og hann er føroyski búskapurin, sum undir hesi samgonguni er vorðin so sterkur, at tað er als ongin trupuleiki at kappa einar 300-400 milliónir av blokkstuðlinum í komandi ári. Forsætismálaráðharrin tók sjálvandi ikki hesar upphæddir upp á tungu, - tær høvdu ikki harmonerað og hóskað inn í mynd og hunddálking hansara av føroyingum, sum primitivir nassarar av Guðs náði.

Klassiska strategiin hjá dønum er komin undir hóttafall. Verður skorið niður í blokkinum, tá kann tað skjótt henda, at ótryggleikamentanin í Føroyum missir takið. Hetta veit stjórnin og hetta veit Peter Duetoft, ið hvein sum ein stungin grísur hendan dagin um, at "……..nú var Danmørkin minkað nokk…………ikki eisini Føroyar(!)"

Danir hava fingið ein stóran politiskan trupulleika av førda fíggjarpolitikkinum hjá Karsteni Hansen. Nyrup & Duetoft og aðrir luxus-imperialistar vilja ikki finna seg í, at landskassin hevur yvirskot, og at ein búskapargrunnur verður skipaður, sum hjálpir føroyingum at skapa sær veruligan tryggleika. Úrslitið ella niðurstøðan av fólkatingsviðgerðini kann tí dragast saman í ein setning: "Nå så kære færinger. Ka´ I så se at bruge pengene i en fart, fordi, hvis I ikke gør det, ja! Så skærer vi blokstøtten væk."

Tær tørvast hvørki at vera sosialráðgevi ella skipsførari fyri at fylgja donsku strategiini. Fimleiki í prosentrokning er heldur ikki neyðugur. Hendan samgongan hevur skorið inn á bein í imperialistiska kyninum. Í stuttum kann sigast: At um vit føroyingar ikki syrgja fyri at knúsa búskapin, við at brúka yvirskotið hjá landskassanum, so missa vit blokkstuðulin. Og tá ið so búskapurin aftur liggur í skeljum, og vit fara akandi á knøunum eftir trotahjálp, eftir at hava sagt farvæl til fullvaldaríkið med alla, ja, tá verður svarið frá dønum so sjálvsagt: "Det må I selv klare."

Blokkstuðulin eitrar mentan okkara og elvir til ótryggleika. Tað er skjalafast, at hetta alla tíðina hevur verið ætlanin við veitingunum, og tað ber ikki til at siga annað enn, at hetta hevur eyðnast dønum fyrimyndarliga, serliga síðani stríðsárini seinru, - við góðari hjálp frá sambands- & javnaðarmonnum, sum Kristiani Magnussen til dømis.

**Reinging og lygnir eru nú seinasta royndin at halda sær uppi í politiska sjóvarmálanum !**

Politiska jørðildi hjá Kristani Magnussen søkkur undan honum. Hetta veit hann væl. Men sum hjá øllum øðrum breyðpolitikkarum ræður tað bara um at røkja taburetlímið sum longst. Og tí er tað, at hann sum ein annar Erasmus Montanus vil prógva, at føroyingar ikki megna at standa uppi fíggjarliga, - av sær sjálvum. Einhvør útsøgn um tað øvugta, at tað ber til, skal tí afturvísast, og um tað er neyðugt, tá eisini við reingingum og lygnum. Gamli stríðsmaðurin, Kristian Magnussen, er vorðin ein hentur býttlingur í hondunum á Poul Nyrup Rasmussen. Ein døpur sjón. Eg má viðganga at hann í seinasta útspælinum er farin undir alt lágmark, og hetta svar hansara eigur ikki at standa ósvarað. Og lat meg bara gera sum mikladalsmaðurin segði við sonin tá ið hann fór uppí fremmandalegiónina: "Kemur tú í nærkamp góði, pín teir tá ikki meira enn neyðugt er, - sting bara nóg djúpt."

Í røðu míni flaggdagin, í Seyrvági og á Giljanesi, segði eg: "Tað er ein sannroynd, at bara 8% av danska blokkstuðlinum komu inn í føroysku ringrásina, í árinum sum farið er."

Í Sosialinum og í Dimmalætting seinasta fríggjadag leggur Kristian Magnussen meg undir talfusk. Hann sigur at talið 8% er ov lágt sett. Rætta talið er 50%, vil hann vera við. Ætlanin hjá Kristiani er at geva fólki ta fatan, at føroyski búskapurin er væl meiri heftur av donskum pengum, enn hann í veruleikanum er tað.

Eg fari ikki at leggja meg útí hvussu Kristian roknar prosentir, men fari heldur at gera greiðu á míni egnu útrokning, sum eftir øllum at døma hevur fingið blóðið í kók á sosialráðgevanum.

**4,35%, - tað var alt Kristian !**

Frøðiligt heiti fyri føroysku framleiðsluringrásina er bruttotjóðarúrtøka(btú). Hetta hugtakið lýsir virðið á samlaðu framleiðslu føroyinga í einum ári.

- Btú fyri ár 2000 var um 8,2 milliardir kr.
- Blokkstuðulin var 959 milliónir kr. (Tað er ikki rætt at rokna endurgjøld viðvíkjandi læraraeftirlønum við í heildarveitingina, soleiðis sum Kristian ger.)
- Yvirskotið í landskassanum var 602 milliónir kr. (Tað er villleiðandi at rokna avdráttir uppí úrslitið soleiðis sum Kristian ger tað. Hetta er líka so tápuligt sum tað hevði verið, at vaksið um úrslitið við stórari lántøku.)
- Parturin av blokkstuðlinum, sum harvið kom út í føroysku ringrásina varð soleiðis bara 959 - 602 = 357 milliónir kr.
- Roknað í prosentum av btú: ((357.000.000 X 100) : 8.200.000.000) = ***4,35%***

Mín ringi óvani, at kjálkað verður ov tætt uppat deadline, táið røður verða skrivaðar, hevur spælt mær eitt puss. Tað má eg viðganga. Visti at somu viðurskifti svaraðu til umleið 8% í 1999. Av tíðarneyð fekk eg ikki eftirkannað talið fyri ár 2000. Men nú skuldi tað so verið greitt fyri øllum - eisini ljósasløkkjaranum Kristiani Magnussen - at eg havi ikki mála støðuna meiri ljósareyða enn hon í veruleikanum er. Tvørturimóti. Tikið varð í so rívan til tá ið eg ásetti hesi 8%´ini. Tað var bara helvtin. Og fáur lýgur meiri enn helvtina verður sagt. Fór nakað skeivur, men tey flestu munnu fara at bera yvir við mær, táið ein sólskinssøga kom burturúr tí tilendans.

Havi gjørt mær tann ómakin at kanna tølini nærri eftir, og serfrøðingar siga fyri vist, at høvuðsniðurstøðan í røðuni er røtt og stendur við. Føroyski búskapurin er væl fyri, og hann hongur saman sum er, - eisini við ongum blokkstuðuli. Parturin, sum vit nýta av blokkinum svaraði seinasta ár bert til góð 4% av búskapinum, og ikki 8 & 50%, sum vit báðir Kristian hava fráboðað. Hartil kann leggjast, at stóri búskaparvøksturin heldur fram í ár, skal man trúgva forsøgn-

*Framhald á næstu síðu*

gult15 cyan15 magenta15 svart15



VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 14*

unum, sum hava verið frammi nú um dagarnar. Hetta merkir so aftur, at eisini í ár fer gongdin at halda fram, soleiðis at blokkurin fær uppaftur minni týðning í samlaða búskapinum frameftir.

Vónandi hevur Kristian Magnussen nú skilt hetta málið. Men kanska eru sosialdemokratisku skýklapparnir soleiðis innrættaðir, at tað sæst ikki uppum eggina á landskassanum. Tað finst eingin verð uttanfyri hendan almenna kassan, sum ein serliga útvald elita av pamparum burdi sitið og gjara út av, - til sínar vinir og kenningar. Ljósasløkkingin, tá ið man sat og taldi niður, nærið hin seinasti føroyingurin mundi fara at sløkkja eftir sær á flogvøllinum, - ber boð um hetta sama. Men hitt føroyska fólkið gjørdi øllum dómadagsprofetiunum til skammar. Uppdriftin í samfelagsins kyknum, sum ikki kann gradast, hevjaði samfelagið á beint aftur. Og ein av tesunum hjá eysturoyingum, um orsøkina til skjóta vøksturin í oynni er hon, at Javnaðarflokkurin altíð hevur verið so hóskiliga lítil her. Skal ikki siga at tað er so. Men dómadagstosið hjá Kristiani m.a., - kundi bent á, at nakað er um tosið. Men Kristian, hesaferð eru tit ovseinir úti, føroyingar síggja nú ígjøgnum imperialistisku tokuna. Ljósið vinnur á myrkrinum umsíðir.

Og nú er eisini somikið fráliðið í aðramáta, at abstinensirnar av miseydnaða misálitinum so smátt munna fara at fortaka seg. Hav tað gott gamli og njót summarferiuna, soleiðis sum tað nú einaferð sømir seg einum forkølaðum og vilstum uppreistrarmanni.

# Sakleys hugmóð

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Landsstýrið og løgtingsmeirilutin fremur ábyrgdarloysi!

So leingi ein skyldar umleið 4 milliardir krónur, sigur ein ikki nei tøkk til 300 – 400 milliónir krónur fyri árið 2002, sum vit hava rætt til í sama danska stati, sum vit skylda meira enn 4 milliardir krónur.

Tað ber væl til at gera ein avtalu við donsku stjórnina um, at vit fastfrysta blokkin á núverandi støði, so minkar hann við inflatiónini. Ella eina avtalu um at minka blokkin varliga yvir nógv ár eftir ávísum formli, og harvið medvirka til ein sjálvbjargnan búskap í Føroyum. Hetta má gerast so varisliga, at tað ikki fer at merkjast á livistøðinum hjá miðal føroyinginum.

Men ikki við 300 – 400 milliónum per ár. Tað er sera vandamikið fyri okkara búskap, okkara livistøði sum vælferðarsamfelag. Tað vita vit øll. Og hetta skal henda samstundis, sum vit yvirtaka málsøkir fyri aðrar 200 – 300 milliónir krónur.

Hetta kemur at merkjast út í hvønn krók í landinum, bæði sum ein beinleiðis og óbeinleiðis fíggjarlig avleiðing. Vit eru ikki oljusjeikar enn! Hetta er skamleys almenn hugmóð. Men hugmóð fellur.

Er tað ynski Føroya landsstýrisins at minka peningarenslið her hjá okkum, so ber tað væl til at lata handan partin av blokkinum fara sum ein eyðka avdráttur upp á skuldina hjá landskassanum í Danmørk.

Tað hevði verið skattalætti upp á langt sikt fyri føroyingar. Tað er “molbo” – politikkur at senda pening retur, so leingi vit skylda í milliarda upphæddum til danska statin.

At Tjóðveldisflokkurin ikki vil skilja hetta, kundi ein kanska roknað við, men at Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin ikki vilja skilja hetta, sum tað ábyrgdarloysi, hetta er, tað undrar. Men veljarar hjá hesum flokkum skilja væl, at slíkt er óðamannaverk og skilaleysur politikkur, tað er vist.

Okkara løgmaður segði í sjónvarpssending beint áðrenn hann fór til Danmarkar at samráðast um fullveldi fyrstu ferð, at hann fór aldri at bjóða føroyingum eina 4 ára skiftistíð at avtaka blokkin. Men hvat ger hann nú? Minkar blokkin við upp til 40 % upp á eitt ár? Soleiðis roynast álitismenn!

Hvør einast føroyingur, óansæð um hann ella hon eru fyri tí sokallaða fullveldinum ella ikki, skilur, at hetta er ikki ábyrgdarfullur politikkur mótvegis Føroya fólki.

Samstundis, sum arbeiðarafeløgini berjast fyri betri korum til tað fólkið, sum arbeiðir við hondunum, tí tey fáa sum er – undir hákonjukturinum vit hava – ikki endarnar at røkka saman fíggjarliga, so frásiga okkara kosnu fólk á løgtingi og í landsstýri okkum ein stóran part av inntøkum landskassans.

At hetta er ábyrgdarleyst og skilaleyst, ja tað skilja øll.

# Yvirlýsing frá ársaðalfundinum hjá KSF

Kvinnusamskipan Føroya hevði Dýra biðidag ársaðalfund í Mettustovu í Havn, har samfelagsstøðan í kvinnupolitiskum høpi varð umrødd.

Í hesum døgum er serliga hugaligt, nú barsilsgrunnurin fer at virka 1. juni. Hetta er heiðurligt tiltak og úteftir ein virðilig mynd av samfelag okkara, har arbeiðsmarknaðurin við lóg tekur ábyrgd av komandi ættarliðum og ger tað høgligari hjá konum at vera lønarbeiðarar og barnamammur.

Arbeiði er aftur til nærum allar vinnuførar hendur. Tað er tí hugstoytt at ásanna, at nógvar ikki fáa lut í barsilsgrunninum, tí tær ikki fáa børn síni ella síni gomlu ansað.

Nú land og kommunur hava fótað sær fíggjarliga, fara vit so staðiliga at biðja tey virka fyri, at ungfólk okkara ikki missa vónina og hugin til at seta føtur undir egið borð.

Smábarnafamiljur vilja vera, har byggilendi og barnaansing eru tøk. Hesin tørvur er hent amboð at stýra bústaðarmynstrinum og vinnulívinum við, so at eisini bygdir og býir uttan fyri Havnina fáa ein veruligan kjans at mennast.

Lívskor føroyinga sum heild standa fyri stórum broytingum. Týdningarmikið hevði tí verið beinanvegin at fingið eina granskingarverkætlan í lag at kanna lívskorini her á landi, har eisini harðskapur á øllum økjum í samfelagnum verður lýstur.

Slík verkætlan kann geva okkum grundleggjandi og ítøkiliga vitan um álvarsom viðurskifti, við annars verða fjald og tagd burtur.

**Vegna**
**Kvinnusamskipan Føroya**

**Inga Ellingsgaard,**
**forkvinna**

# Matiné í Havnar kirkju



Leygardagin 19 mai klokkan 11.30 verður matiné í Havnar kirkju við tí væl umtókta Havnar Manskóri. Tað er Bjarni Restorff, sum stjórnar kórinum, og skráin verður í høvuðsheitum sálmar og sangir úr Føroyum og aðrastaðni við.

# Oggi umborð á sluppini Høganes

TÍÐINDASKRIV

Forvitnislig listaframsýning umborð á Sluppuni Høganes. Tað er 30 ára gamli listamaðurin Karstin Olgar Lamhauge (Oggi) úr Søldarfirði, sum sýnur fram grafiskar myndir. Talan er um 17 grafiskar myndir og listamaðurin hevur nýtt ymisk grafisk tøkni so sum steinprent, turrnál, linoliumskurður og einprent. Listamaðurin ynskir at skapa eina myndlistarliga heild á sýningini og tó leggja dent á frávikini, sum koma til sjóndar.

Listamaðurin hevur verið við á fleiri várframsýningum og hevur umframt hetta víst síni verk fram saman við øðrum. Umframt hesa aðru almennu stakframsýning hansara, her á landið, hevur hann latið altartalvan úr hondum, til Hattarvíkar Kirkju og hendan var vígd 9. Juli í fjør.

Sýningin verður opin frá týsdegnum 15. mai til hósdagin 17. mai og verður opin um somu tíðir sum fiskivinnustevnan á staðnum.